

# HENDURNAR UPP ELLA BUKSURNAR NIÐUR

## # 3 Jenis av Rana:



1. **Kall ella Føroya Tele?**
- Føroya Tele

2. **Jolly ella Coca Cola?**
- Coca Cola

3. **Rás 2 ella útvarp Føroya?**
- Rás 2

4. **Quality ella Roses?**
- Roses

5. **Siemens ella Nokia?**
- Nokia

6. **Loysing ella samband?**
- Loysing

7. **Flúgva ella sigla?**
- Flúgva

8. **Føroya Bjór ella Restorff?**
- Føroya Bjór

9. **Fótbóltur ella hondbóltur?**
- Fótbóltur

10. **Dimma ella Sosialurin?**
- Dimma

11. **Tomat ella agurk?**
- Tomat

12. **Svart ella hvítt?**
- Hvítt

13. **Pizza ella grill?**
- Grill

14. **Fløgu, band ella plátu?**
- Fløga

15. **Kaffi ella te?**
- Te

16. **Jakka ella frakka?**
- Jakka

17. **Lissir ella karalás?**
- Lissir

18. **Rock ella popp?**
- Rock

19. **Mamma ella babba?**
- Mamma

20. **MacIntosh ella PC?**
- PC

21. **Per ella Pól?**
- Per

22. **Um tú var ein bilur, hvat slag skuldi tú so verið?**
- Eg haldi, at eg skuldi verið ein Saab

23. **Hvør hevði sloppið at koyrt ella hvør hevði als ikki?**
- Konan hevði so avgjørt sloppið at koyrt, men tann sum koyrdi 200 í Vágatunlinum hevði so avgjørt ikki sloppið.


<ph_1>

**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76
100 Tórshavn
Tlf. 31 18 20
Fax 31 47 20
Teldupostur: ph_1@sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
Solby Anna Eliasen

<ph_1> er ein partur av Sosialinum annanhvønn mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Lýsingar til <ph_1> skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin áðrenn blaðið kemur út.

Lýsingarnar skulu ikki vera størri enn 254 mm breiðar og 70 mm høgar.


## Vit skriva:

Fyri tey, sum ætla at søkja víðari lesnað, tað veri seg miðnámsskúlar, universitet ella líknandi, er tíðin rættiliga farin at styttast til freistin at søkja er úti. Um miðjan mars mánaða plaga tær fyrstu freistirnar at vera.

Hetta er ein krossvegur í lívinum hjá teimum flestu, tí tær avgerðirnar, sum tú tekur í dag, kunnu koma at hava ávirkan á teg restina av lívinum.

Tað er tískil sera umráðandi, at ein hugsar seg væl um, áðrenn endaliga avgerðin verður tikin. Skilagott er at tosa við ein ella annan, sum kann vegleiða einum í hesi týdningarmiklu avgerð. Sum til dømis ein lestrarvegleiðara.

Summi koma lættliga í gjøgnum hesa tíð, tí tey frammanundan hava vitað, hvat tey vilja lesa ella verða. Onnur hava ómetaliga torført við at finna útav, hvat tað skal verða, men ongin hevur nakrantíð sagt, at tað er lætt.

Student ella HF, universitet ella háskúlar av ymsum slag ella lærupláss til tey, sum ikki tíma skúla so væl. Nógv er at velja millum. Og ikki lætt at avgera. Og um ein hevur ætlanir um at fara av landinum til víðari lesnað er nógv ymisk ting at taka støðu til.

Finnast skal út av, hvat ein hevur hug til. Og valmøguleikarnir eru nógvir í eitt nú Danmark. Ynskir ein at útbúgva seg í Føroyum eru møguleikarnir meira avmarkaðir, men treyðugt so, eru tað mong, sum fáa teirra útbúgving herheima.

Men tíbetur eru øll ikki eins, og tey eru mong í tali, sum ynskja at fara aðrastaðni at nema sær útbúgving og harvið økja um teirra sjónarring. Mong eru, sum ikki heilt vita, hvat tey vilja verða, og tey royna tí ymiskt fyri at finna út av tí. Men tað er ikki altíð bara sum at siga tað, tí tað er sum sagt ein stór avgerð. Tað, tú velur at verða, verður tú restina av tínum lívi, men her skal tó leggjast afturat, at um ein angrar tað ein hevur valt, so er onki til hindurs fyri at steðga og royna okkurt annað.

Eitt sum ein má finna útav, tá ein skal aðrastaðni at lesa, er bústaður. Men tað er ongin loyna, at tað er sera torført at fáa nakað at búgva í í Danmark. Ferð eftir ferð hoyrir ein um ungfólk, sum eru sloppin inn á skúla í Danmark, men tey hava ongastaðni at búgva. Men sagt verður, at ein má vera í góðari tíð við at søkja um bústað, um ein skal gera sær nakrar vónir um at finna nakað at búgva í. Sjálvandi eru summi heppin, men hepni er ikki nakað, sum ein skal líta á, tá tað kemur til bústað í Danmark.

Um ein hevur longsul til útlandið, so nýtist tað sjálvandi ikki endilga at vera Danmark, ein fer til. Føroyingar lesa nógvastaðni runt í heiminum. Fyri uttan Danmark er Ongland og Skotland vælumtókt til at nema sær útbúgving í.

<Ph_1> hevur tikið útbúgvingar upp í blaðnum hesuferð, og vit hava tosað við nøkur ung, sum eru og hava verið undir útbúgving í Danmark. Tey greiða frá teirra útbúgvingum og øðrum viðurskiftum.

<ph_1>



## Vangamyndin: Andrew av Fløtum



# Eg havi hjYrtað við



Vit kenna hann millum annað sum HB-leikara. Hann gjørdist toppskorari og ársins leikari hjá 1. deild monnum í fótbólti í farna kappingarári. Vit kenna hann eisini frá landsliðinum, har tað gekk sera væl hjá honum í fjør. Vit tosa nevniliga um Andrew av Fløtum

-– Eg fór at spæla fótbólt, tá ið eg var 7 ára gamal. Tá fór eg í 1. flokk, og tá byrjaðu allir hinir dreingirnir í flokkinum at spæla, og teir spældu allir við HB, so tað vildi  eg eisini. Ein kann næstan kalla tað bólkatrýst, flennir Andrew.

Fyrimyndirnar hjá Andrew eru Michel Platini,Gary Lineker og føroysku leikarnir Bjarni Jacobsen og Rói Árting.

Sum flestu aðrir fótbóltsspælarar, hevur Andrew eisini dreymin,  at koma uttanlands at spæla, men heldur sjálvur, at hann er vorðin ov gamal, tí feløgini vilja hava ungar spælarar millum um 16-20 ára aldur, so møguleikin hjá Andrew er ikki longur so stórur. Men Andrew sigur, at hann hevði fegin viljað upplivað ta kenslu, at spælt við einum útlendskum liði.

– Eg haldi, at støðið í føroyskum mansfótbólti er blivið hægri enn tað hevur verið. Tað er ræðuliga stórur munur á teimum fremstu og á teimum aftastu liðunum í 1. deild. Fyri at bøta um hetta, haldi eg,  at man burdi skorið talið á liðum í fyrstu deild niður. Kanska til 8 ístaðin fyri 10 lið, sigur Andrew, sum leggur afturat, at kappingarárið í føroyskum fótbólti er alt ov stutt. Vetrarfrítíðin er ov lang og kappingarárið sjálvt kundi eisini byrjað ella endað fyrr.

Andrew væntar ikki, at støðið í føroyskum fótbólti nakrantíð verður so gott, at allir spælarar í øllum liðunum í 1. deild kunnu liva bara av fótbóltinum. Nakrir gera tað longu, men tað eru ógvuliga fáir, sum onki arbeiði hava við síðuna av.

Nógvir spælarir fara frá liði til lið, fyri peningsins skyld . Men Andrew hevur altíð spælt í HB.

– Tá eg spæli, havi eg hjartað við. Tað er týdningarmikið fyri meg, hvat liðið er, sum eg spæli fyri. Fleiri feløg hava givið mær góð tilboð, men eg haldi ikki, at eg nakrantíð fari frá HB uttan so, at tað verður, at eitt útlendskt felag bjóðar upp á meg. Eg eri stoltur av at vera HB´ari, sigur Andrew. Og hetta er kanska ikki so undarligt, tí HB gjørdist jú eisini føroyameistari í fjør.

Tá kappingarárið í fjør var liðugt, varð Andrew valdur til ársins leikara og eisini var hann toppskorari í 1. deild.

– Trýstið verður sjálvandi størri, tí fólk vænta meira av tær. Men ein slíkur heiður má heldur ikki gerast ein púta at sova á, sigur Andrew, sum sjálvur heldur, at hann var heppin í fjør. Men evnini eru so upp á pláss, tað kann ein róliga staðfesta.

Spurdur um, hvør hansara besta uppliving í fótbóltinum hevur verið svarar hann, at tað hevur verið tá HB gjørdist føroyameistari, og tá Føroyar spældu ímóti Týsklandi í Hannover.

Hvussu leingi Andrew ætlar at spæla, veit hann ikki rættiliga.

– Tað verður so leingi eg kann og tími, sigur Andrew, sum um hann ikki hevði spælt fótbólt hevði spælt tennis.







| | |
|---|---|
| **Navn:** | Andrew av Fløtum |
| **Føðingardagur:** | 13.06.1979 |
| **Starv:** | Sølumaður hjá Restorff's bryggjarí |
| **Yndisorð:** | Ordan |
| **Hvat vildi tú verða, tá tú vart stórur, tá tú vart lítil?** | Fótbóltsleikari |